Kunngerð um veiðu eftir lodnu við fiskiførum undir føroyskum flaggi í íslendskum sjógvi í 2021

Við heimild í § 23, stk. 1 og 2, § 34, stk. 2, nr. 2 og 4 og stk. 3 og § 64, stk. 2 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020 og løgtingslóg 185 frá 18. desember 2020, verður ásett:

Virkisøki

§ 1. Kunngerðin fevnir um fiskiskap eftir lodnu í serbúskaparøkinum hjá Íslandi við fiskiførum undir føroyskum flaggi sambært fiskiveiðiavtalu millum Føroyar og Ísland.

Áseting av heildarkvotu og býti av kvotuni

§ 2. Loyvt verður fiskiførum undir føroyskum flaggi at fiska lodnu í íslendskum sjógvi sambært fiskiveiðiavtalu millum Føroyar og Ísland.

Stk. 2. Føroyska kvotan verður ásett samsvarandi fráboðan, sum íslendskir myndugleikar eftir avtalu landanna millum senda Fiskimálaráðnum.

Stk. 3. Kvotan, ásett sambært stk. 2, verður latin teimum, sum í 2018 høvdu rættindi at fiska av egnari árskvotu av lodnu í íslendskum sjógvi. Egin kvotupartur hjá hvørjum rættindahavara er, tá henda kunngerð fær gildi, samanløgdu egnu kvotupartarnir í hvørjum fiskiloyvi sambært 1. pkt., sum viðkomandi hevði rætt til í 2018. Fiskiskapurin verður skipaður við egnari árskvotu.

Treytir viðvíkjandi at frysta umborð og at landa uttan fyri Ísland

§ 3. Er loyvda nøgdin, sambært § 2, stk. 2, 30.000 tons, er til og við 17. februar 2021 loyvt føroyskum skipum tilsamans at landa í mesta lagi 20.000 tons til frystingar uttan fyri Ísland, ella at frysta umborð.

Stk. 2. Er loyvda nøgdin, sambært § 2, stk. 2, minni enn 30.000 tons, er til og við 17. februar 2021 loyvt føroyskum skipum tilsamans at landa til frystingar uttan fyri Ísland, ella at frysta umborð, í mesta lagi ¾ av nøgdini sambært § 2, stk. 2.

Stk. 3. Eftir 17. februar 2021 er loyvt føroyskum skipum tilsamans at landa til frystingar uttan fyri Ísland, ella at frysta umborð, í mesta lagi ⅓ av nøgdini sambært § 2, stk. 2. Er føroyska kvotan, sambært § 2, stk. 2, undir 12.000 tons, kunnu føroysk skip tó tilsamans landa til frystingar uttan fyri Ísland ella frysta umborð 4.000 tons, tó ikki meir enn ásetta kvotan sambært § 2, stk. 2.

Stk. 4. Frysting umborð og at landa til frystingar uttan fyri Ísland kann ikki halda fram, tá nøgdirnar sambært stk. 1-3, sum kunnu frystast umborð ella verða landaðar til frystingar uttan fyri Ísland, eru brúktar.

Stk. 5. Parturin at landa til frystingar uttan fyri Ísland, ella at frysta umborð á føroyskum skipum, verður tilskilaður í fiskiloyvinum.

Fiskiloyvi

§ 4. Fiskiskapur eftir lodnu í íslendskum sjógvi kann bert fara fram við fiskifari, sum eftir skrivligari umsókn hevur fingið fiskiloyvi frá Vørn til slíkan fiskiskap, og um Vørn hevur váttað, at tey eru á lista yvir fiskifør, sum Ísland hevur givið loyvi at fiska í íslendskum sjógvi.

§ 5. Skiparin skal, sambært § 23, stk. 3 í løgtingslógini, fylgja teimum treytum, sum galda fyri fiskiskap í íslendskum sjógvi.

Eygleiðari

§ 6. Vørn ger av, um eygleiðari skal vera umborð á fiskiførum, ið fiska sambært hesi kunngerð. Fiskifarið ber allar útreiðslur av at hava eygleiðara umborð, sbr. § 34, stk. 2, nr. 4, 3. pkt. í løgtingslógini. Eygleiðarar hava loyvi at nýta

samskiftisútgerðina umborð til tess at hava samband við Vørn og við aðrar myndugleikar.

Fráboðanir

§ 7. Fiskifar, sum sambært hesi kunngerð fiskar í íslendskum sjógvi, skal senda hesar fráboðanir til Vørn sambært skjali 1:

1) Fráboðan um, at fiskiskapur byrjar. Fráboðanin skal sendast, í fyrsta lagi 6 tímar og í seinasta lagi 2 tímar, áðrenn skipið kemur inn í íslendskan sjógv.
2) Veiðifráboðan hvønn dag. Hvønn dag, millum kl. 6 og kl. 8 UTC, skal boðast frá veiðu fyri undanfarna samdøgur. Fráboðanin skal sendast, sjálvt um eingin veiða er fingin.
3) Fráboðan um, at fiskiskapur endar. Fráboðanin skal sendast, í fyrsta lagi 6 tímar og í seinasta lagi 2 tímar, áðrenn skipið fer úr íslendskum sjógvi.

Stk. 2. Fiskifarið skal somuleiðis senda íslendskum myndugleikum fráboðanir samsvarandi teimum reglum, sum galda fyri fiskiskap í íslendskum sjógvi.

Revsing o.a.

§ 8. Brot á §§ 4 og 6 og § 7, stk. 1 verða revsað við sekt, er ikki harðari revsing ásett eftir aðrari lóg.

Stk. 2. Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

Stk. 3. Sambært § 70 í løgtingslógini kann Vørn beinanvegin taka aftur rættin til at reka vinnuligan fiskiskap, um brot er framt sambært stk. 1, um fiskað er meira enn loyvt er sambært fiskiloyvinum ella sambært hesi kunngerð, ella um fiskifar ikki heldur seg til treytir ásettar í fiskiloyvinum sambært § 4, stk. 1 í hesi kunngerð. Rætturin at reka vinnuligan fiskiskap kann takast aftur upp til 4 vikur hvørja ferð.

Gildistíð

§ 9. Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 1. mai 2021.

Fiskimálaráðið, 2. februar 2021

Jacob Vestergaard (sign.)
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

Skjal 1

Fráboðanir til Vørn

Niðanfyri standandi fráboðanir skulu sendast VØRN í XML sniði umvegis heimasíðuna www.vorn.fo, undir “talgild móttøka”. Fráboðanir kunnu eisini sendast umvegis heimasíðuna, www.vorn.fo, undir “fráboðanir”.

1) COE - Fráboðan um, at fiskiskapur byrjar. Skal sendast, í fyrsta lagi 6 tímar og í seinasta lagi 2 tímar, áðrenn skipið kemur inn í íslendskan sjógv.

Fráboðanin skal hava fylgjandi tekst:

Dataelement	Koda	Frágreiðing

Fráboðan	TM	COE, fráboðan um, at fiskiskapur byrjar (Catch on Entry)
Raðnummar	SQ	Nummar á fráboðanini
Loyvisnummar	LC	Nummar á fiskiloyvi
Beinleiðis veiða	DS	Fiskaslag sum beinleiðis veiða er eftir
Radio kallimerki	RC	Kallimerki hjá skipinum
IMO nummar	IM	IMO nummar á skipinum (um tøkt)
Túranummar	TN	Túrur hjá skipinum í hesum árinum
Skip	NA	Navn á skipinum
Skipari	MA	Navn á skiparanum
Havnarkenningarnummar	XR	Havnarkenningarnummar hjá skipinum
Veiðiøki	RA	Økið hagar skipið fer til fiskiskap
Breiddarstig	LA	Knattstøða (N/S breidd), tá fráboðanin verður send
Longdarstig	LO	Knattstøða (E/V longd), tá fráboðanin verður send
Veiða umborð	OB	Veiða umborð flokkað eftir fiskasløgum (FAO 3 alpha kodu). Veiðan skal gevast upp í rundari vekt í kg.
Dagfesting	DA	Dagfesting, tá fráboðanin er send (dd-mm-yyyy)
Klokkutíð	TI	Klokkutíð, tá fráboðanin er send í UTC (24M h:m)
Viðmerkingar	RE	Viðmerkingar

2) CAT - Veiðifráboðan hvønn dag. Fráboðanin skal sendast, sjálvt um eingin veiða er fingin. Skal sendast dagliga millum kl. 6 og kl. 8 UTC.

Fráboðanin skal hava fylgjandi tekst:

Dataelement	**Koda**	**Frágreiðing**
Fráboðan	TM	CAT, veiðifráboðan (Daily Catch report)
Raðnummar	SQ	Nummar á fráboðanini
Loyvisnummar	LC	Nummar á fiskiloyvi
Beinleiðis veiða	DS	Fiskaslag, sum beinleiðis veiða er eftir
Radio kallimerki	RC	Kallimerki hjá skipinum
IMO nummar	IM	IMO nummar á skipinum (um tøkt)
Túranummar	TN	Túrur hjá skipinum í hesum árinum
Skip	NA	Navn á skipinum
Skipari	MA	Navn á skiparanum
Havnarkenningarnummar	XR	Havnarkenningarnummar hjá skipinum
Veiðiøki	RA	Økið har skipið er til fiskiskap
Breiddarstig	LA	Knattstøða (N/S breidd), tá fráboðanin verður send
Longdarstig	LO	Knattstøða (E/V longd), tá fráboðanin verður send
Veiða	CA	Veiða undanfarna samdøgur frá 00.00 til 23.59(CAT), flokkað eftir fiskasløgum (FAO 3 alpha kodu). Veiðan skal gevast upp í rundari vekt í kg.
Samlað veiða umborð	TC	Samlað veiða umborð (FAO 3 alpha kodu), í rundari vekt í kg.
Dagfesting	DA	Dagfesting, tá fráboðanin er send (dd-mm-yyyy)
Klokkutíð	TI	Klokkutíð, tá fráboðanin er send í UTC (24H h:m)
Viðmerkingar	RE	Viðmerkingar

3) COX - Fráboðan um, at fiskiskapur endar. Skal sendast, í fyrsta lagi 6 tímar og í seinasta lagi 2 tímar, áðrenn skipið fer úr íslendskum sjógvi.

Fráboðanin skal hava fylgjandi tekst:

Dataelement	**Koda**	**Frágreiðing**
Fráboðan	TM	COX, fráboðan, at fiskiskapur endar (Catch on Exit and control report)
Raðnummar	SQ	Nummar á fráboðanini
Loyvisnummar	LC	Nummar á fiskiloyvi
Beinleiðis veiða	DS	Fiskaslag, sum beinleiðis veiða hevur verið eftir
Radio kallimerki	RC	Kallimerki hjá skipinum
IMO nummar	IM	IMO nummar á skipinum (um tøkt)
Túranummar	TN	Túrur hjá skipinum í hesum árinum
Skip	NA	Navn á skipinum
Skipari	MA	Navn á skiparanum
Havnarkenningarnummar	XR	Havnarkenningarnummar hjá skipinum
Veiðiøki	RA	Økið hvaðani skipið kemur av fiskiskapi
Breiddarstig	LA	Knattstøða (N/S breidd), tá fráboðanin verður send
Longdarstig	LO	Knattstøða (E/V longd), tá fráboðanin verður send
Veiða	CA	Veiða, fiskað undanfarna samdøgur frá 00.00-23.59, flokkað eftir fiskasløgum (FAO 3 alpha kodu). Veiðan skal gevast upp í rundari vekt í kg.
Samlað veiða umborð	TC	Samlað veiða umborð (FAO 3 alpha kodu), í rundari vekt í kg.
Móttøkuhavn	PO	Havn har fiskurin verður uppskipaður/umskipaður
Landað ella umskipað	TR	Upplýs hvat virki ella skip veiðan verður landað ella umskipað til.
Dagur, tá veiðan verður landað ella umskipað	PD	Dagurin, tá mett verður, at veiðan verður landað ella umskipað (dd-mm-yyyy)
Klokkutíð, tá veiðan verður landað ella umskipað	PT	Tíð á degnum mett verður, at veiðan verður landað ella umskipað (24H h:m)
Dagfesting	DA	Dagfesting, tá fráboðanin er send (dd-mm-yyyy)
Klokkutíð	TI	Klokkutíð, tá fráboðanin er send í UTC (24H h:m)
Viðmerking	RE	Viðmerking